# Endurreisa ungmannafelagið

**Húsavík:** Eftir ein steðg, er nú avgerð tikin um at endurreisa nevndina í ungmannafelagnum Sólarris.

Fyrsta tiltakið í so máta er ein veitsla, sum verður hildin eftir kyndilsmessu.

Hvat so annað verður á skránni, fer tíðin at vísa.

**sb.**



ENDURREISN

*Ungmannafelagið Sólarris í Húsavík er nú farið til verka aftur*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Nógv at stuðla

**Sandur:** Mánakvøldið fer bygdaráðið á Sandi at hava kommunustýrisfund.

Millum tey mongu málini á skránni er ein hópur av umsóknum um fíggjarligan stuðul í ár. Hesar umsóknir eru ikki færri enn 8 í tali, og eru frá so ymiskum umsøkjarum sum Ungmannafelagnum Virkinum á Sandi, Sandoyar Kunningarstovu, B71, Sands Róðrarfelag, Sands Skjótifelag, blaðnum "Eftirskúlin", Føroya Psykiatrifelag og ein umsókn frá Evi Tommysdóttir Djurhuus, um keyp av fløgu hennara.

Á skránni er millum annað eisini spillivatnsætlanin, byggisamtyktin og ein umsókn frá R2 Net um loyvi at seta upp tvær gittarmastrar á Knúki.

**sb.**



GOTT LAG

*Menn eru í góðum lagi, nú arbeiði er á flakavirkinum í Skopun*

*Mynd: Jens Kristian Vang*